# Við TB veitst tú ongantíð

**Liðskiparin hjá TB helt, at nervar og persónligir feilir merktu steypafinaluna. — Men hatta er tað sama sum altíð. Við TB veitst tú ongantíð, segði hon**



*Hatta er tað sama sum altíð. Við TB veitst tú ongantíð, segði fegni liðskiparin hjá TB, Svanna Nielsen, tá tað loksins var greitt, at TB er steypavinnari*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

- Hetta var fantastiskt.

Tað var fyrsta viðmerkingin hjá liðskiparanum hjá TB, Svannu Nielsen, aftaná finalusigurin móti Mjølni



*- Vit eru væl við í øllum settunum og koma væl frá byrjan, men so gongur galið. Tað er sum um vit blíva bangnar fyri at sláa ígjøgnum og avgera bóltarnar, og so taka tær okkum aftur, segði Marjun Kalsø millum annað, tá tapið var veruleiki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

leygardagin.

Tær vunnu tvey tey fyrstu settini eftir at hava verið aftanfyri í báðum, taptu tað triðja stórt og vunnu so tað fjórða, sum var sera javnt.

- Vit vóru fullar av nervum í byrjanini, og tað sást eisini. Og í triðja setti vóru vit sløvar — tað er heldur ikki fyrstu ferð, segði Svanna.

Svanna Nielsen helt, at tær allar — ikki minst hon sjálv — gjørdu nógvar persónligar feilir, sum høvdu við sær, at Mjølnir kom framum bæði í fyrsta og øðrum setti og eisini vann triðja sett stórt.

- Men hatta er tað sama sum altíð. Við TB veitst tú ongantíð, legði hon afturat.

- Áskoðararnir hjá okkum vóru fantastiskir. Teir hjálptu okkum, tá tað stóð mest á, segði TB-liðskiparin, sum eisini takkaði áskoðarunum fyri stuðulin.

## Ov bangnar

Liðskiparin hjá Mjølni, Marjun Kalsø, hevur roynt tað mesta í føroyskum flogbólti. Og eftir at hava vunnið steypafinaluna tvey ár á rað hevur hon nú eisini roynt at tapa hana. Hon helt, at dysturin kundi farið báðar vegir.

- Vit eru væl við í øllum settunum og koma væl frá byrjan, men so gongur galið. Tað er sum um vit blíva bangnar fyri at sláa ígjøgnum og avgera bóltarnar, og so taka tær okkum aftur, segði Marjun, eftir at hon hevði tikið ímóti silvurmerkinum.

- Vit gera eisini alt ov nógvar servifeilir, og tað er kanska størsta orsøkin til, at vit tapa, helt »the grand old woman« í føroyskum flogbólti.

## Bara FM eftir

Venjarin hjá TB var sum vera man ein fegin maður aftaná dystin.

- Nú vóna vit, at vit eisini gerast føroyameistarar um eina viku, segði Virgar Djurhuus. TB er so væl fyri í landskappingini, at ein sigur í trimum teimum seinastu dystunum er nóg mikið til at tryggja teimum føroyameistaraheitið — og tann sigurin kann koma longu næsta vikuskifti.

Um sjálvan dystin helt Virgar, at tað kundi verið betri, men sjálvandi ber illa til at kæra seg um tað.

- Vit byrja ofta veikt, og Mjølnir kom eisini langt framum bæði í fyrsta og øðrum setti. Okkara gjørdu nógvar persónligar feilir, og tað var fyrst og fremst orsakað av nervum, helt venjarin.

- So taptu vit stórt í triðja setti. Tá høvdu leikararnir kroppin inni á vøllinum, men høvdið uttanfyri. Tær hugsaðu ov langt fram.

At TB nú hevur vunnið steypafinaluna og ivaleyst eisini verður føroyameistari, er ikki minst eitt herðaklapp til venjaran. Hann var ikki venjari frá byrjan, men eftir at italski venjarin Emanuele Leoni fór avstað aftur, stutt eftir at kappingin var byrjað, samstundis sum hann tók unnustuna, sum eisini spældi við á liðnum, við sær, hevur Virgar Djurhuus staðið á odda fyri liðnum. Og tað hevur víst seg, at tað als ikki hevur ávirkað úrslitini hjá TB. Eitt gott dømi um, at tann skilabesta loysnin ikki altíð er útlendsk.



*Kvinnurnar hjá TB kunnu nú rópa seg steypavinnarar 2002, og gongst eftir vild kunnu tær longu um eina viku rópa seg fyri føroyameistarar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Gongur framá hjá Holte

**Holte IF vann sunnudagin 3-0 móti Middelfart VK, og nú gongur framá hjá Bárði og teimum. Tað sær út til, at teir nú eru um at fáa skil uppá spælið hjá sær, serliga verjupartin**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Eftir nøkur keðilig úrslit sær nú út til, at Holte IF, har Bárður B. Mikkelsen er ein av leikarunum, nú hevur fingið eitt sindur blíðari byr aftur.

Sunnudagin spældu teir á heimavølli móti Middelfart VK, og Holte vann dystin 3-0. Hóast dysturin var tættur, so høvdu Bárður og teir yvirvág allan dystin, og settúrslitini vóru 25-20, 25-23 og 25-19.

Bárður heldur, at teir nú eru um at fáa skil uppá sítt spæl, serliga verjupartin, sum riggaði stak væl sunnudagin. Tað er verjan, sum hevur givið teimum trupulleikar fyrr í kappingini, og tí hava teir arbeitt serliga nógv við verjupartinum henda síðsta mánaðin. Og hetta man hava hjálpt, tí sunnudagin spældi verjan sera væl.

Sigurin sunnudagin hevði eisini stóran týdning við tað, at Middelfart eisini er eitt av liðunum, sum stríðist um síðstu plássini til hálvfinalurnar. Nú leygardagin skal Holte til Odense at spæla móti DHG. Eisini tann dysturin hevur stóran týdning, tí bæði liðini eru í somu støðu, og fyrr í endaspælinum tapti Holte á heimavølli móti DHG.

Kappingin er soleiðis skipað, at í aðrari hálvfinaluni møtast nummar eitt og nummar fýra, og í hinari eru tað so nummar tvey og trý. Málið hjá Holte er tí at enda nummar tvey ella trý fyri at sleppa undan at møta HIK Aalborg í hálvfinaluni. HIK eru stórfavorittar til at endurvinna danska meistaraheitið.



# Finalan stendur ikki nógv aftanfyri FM

**Sjálvt um føroyameistaraheitið neyvan endar í Sørvági í ár, so helt Suni Hansen, at tað at vinna steypafinaluna ikki stendur nógv aftanfyri. - Lið, sum vinna føroyameistaraheitið, hava upplivað, at tað bara hava verið eini 10-15 áskoðarar til tann avgerandi dystin. Tað stendur so ikki mát við umstøðurnar her, segði hann**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Av onkrari grund, sum er hesum skrivaranum ókend, tveittu overfegnu áskoðararnir rís eftir vinnarunum, tá steyp og heiðursmerki vórðu latin SÍ. Tað gresjaði eisini eitt sindur undir skónum, tá vit fingu orðið á størsta veteranin á SÍ-liðnum. Suni Hansen er fuglfirðingur, men spælir í ár við SÍ. Hann var sjálvandi sera fegin um at hava vunnið steypafinaluna, men tað var ikki frítt, at hann eisini hevði samkenslu við ÍF, sum hevði so ringar umstøður upp undir finaludystin.

- Sjálvandi er tað gott at vinna, og eg eri glaður, men tað hevði verið enn stuttligari, hevði ÍF-liðið verið fullmannað, helt Suni Hansen, sum eftirhondini hevur upplivað tað mesta, sum er vert at uppliva í føroyskum flogbólti.

Men samanumtikið var lagið gott.

- Føroyameistaraheitið er fokið, og tað kunnu vit takka okkum sjálvum fyri, men tað at vinna steypafinaluna stendur ikki nógv aftanfyri. Lið, sum vinna føroyameistaraheitið, hava upplivað, at tað bara hava verið eini 10-15 áskoðarar til tann avgerandi dystin. Tað stendur so ikki mát við umstøðurnar her. Hetta er sera stuttligt at vera við til, segði Suni.

Um spælið helt hann, at tað kanska hevur verið betri fyrr, men hann rósti serliga blokkinum fyri gott arbeiði.

- Í øðrum setti dovna vit eitt sindur, men vit vakna aftur. Og í hinum báðum settunum var eingin ivi, so samanumtikið kunnu vit vera væl nøgdir við dystin, helt hann.

Suni Hansen takkaði eisini áskoðarunum, sum stuðlaðu teimum óføra væl allan dystin á tamb, og teir gjørdu eisini dagin enn stuttligari hjá liðnum.



*Fyri fyrstu ferð kann SÍ rópa seg steypavinnari, og sum vera man, var lagið gott, tá alt var leyst og liðugt*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*- Føroyameistaraheitið er fokið, og tað kunnu vit takka okkum sjálvum fyri, men tað at vinna steypafinaluna stendur ikki nógv aftanfyri, helt Suni Hansen eftir dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*- Vit koma sterkt aftur. Síggja vit burtur frá Ólavi Ellingsgaard var elsti maður hjá okkum í dag 27 ár, so liðið hevur tíðina fyri sær, segði Bartal Eliasen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Høvdu roknað við tí

Júst afturkomin av venjingarlegu við fótbóltslandsliðnum í hinum endanum av Evropa kom Bartal Eliasen heim til steypafinaluna, og við umstøðunum upp til dystin var greitt, at nógv fór at liggja á hansara herðum, nú ÍF skuldi royna at fáa sum frægast burturúr finaluni.

Tað gekk einki serligt, og tá alt kom til alt, var ósigurin rættiliga greiður.

- Sjálvandi eri eg vónbrotin, tí vit taptu. Men í roynd og veru høvdu vit roknað við, at tað fór at enda soleiðis, tí sum øll vita, hava umstøðurnar og fyrireikingarnar hjá okkum verið alt annað enn góðar. Men tað merkir sjálvandi ikki, at vit ikki fóru inn fyri at vinna, og vit trúðu eisini uppá, at tað kundi bera til, segði Bartal Eliasen, sum eisini sá troyttur út eftir eina strævna viku.

- Men vit koma sterkt aftur. Síggja vit burtur frá Ólavi Ellingsgaard var elsti maður hjá okkum í dag 27 ár, so liðið hevur tíðina fyri sær, segði Bartal Eliasen.

VÍF-Tjaldur 33-32 (14-12):

# Tað reið um snarið

**Vestmenningar ridlaðu – men hildu kortini fast – tá Tjaldur vitjaði sunnudagin. Bert eitt mál skilti partarnar, hallartalvan hevði ýlt fyri seinastu ferð**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Hóast vestmenningar í ár fyri tað mesta hava verið hampuliga einráðandi á føroysku hondbóltindunum, so skerst ikki burtur, at serstakliga á manssíðuni hevur liðið havt okkurt slag av motivatiónstrupulleikum. Fleiri ferðir hava teir havt alstórar trupulleikar, tá á pappírinum væl veikari lið hava verið mótstøðan, og í meðan tað í einum einstøkum føri hevur kostað stig, so hevur tað aðrar tíðir verið heilt nær við.

## Góvust ongantíð

Eitt av hesum førunum var sunnudagin, tá Tjaldur kom á vitjan. Munurin millum liðini átti alt annað líka at verið hampuliga stórur, tí hóast Tjaldur tykist hava sett kós móti ovaru hálvu av stigatalvuni, so er enn langt á mál, áðrenn liðið kann sammetast við VÍF.

Tað løgdu runavíkingar tó vertin á, tá teir fóru á vøllin sunnudagin. Gaman í vóru teir alla tíðina aftan fyri móti oddaliðinum, men teir sleptu ongan tíð takinum. Fyri tað allar mesta vóru tað bert eini tvey trý mál á muni, og tó at heimaliðið tóktist hava tryggjað sær sigurin seinasta korterið, so kom spenningur kortini. VÍF var tá annars á odda við fimm málum eitt skifti, men kortini gjørdist tað heilt spennandi seinastu løtuna, tí meðan VÍF gavst at skjóta mál tríggjar teir seinastu minuttirnar, so skoraði Tjaldur tríggjar ferðir í sama tíðarbilli, men sum máltalvan vísur, so gjørdist tað kortini akkurát ov lítið.

## Løgin trupulleiki

Sum sagt, so tykjast vestmenningar framvegis at hava ein motivatiónstrupulleika, men tða má sigast at vera óskiljandi, at so skal vera. Teir eru á odda í kappingini, og hava bert tørv á fýra sigrum í seks dystum fyri at gullið skal verða veruleiki. Kann hetta ikki vera við til at seta menninar upp, er ilt at síggja, hvat skal til.

Hetta skal tó ikki taka nakað frá Tjaldrinum. Liðið hevur í ár tikið seg heilt nógv fram, og hevur í fleiri dystum víst, at teir væl kunnu takast við tey stóru, men enn restar bara seinasta pettið í, áðrenn teir veruliga kunnu fara at blanda seg í oddastríðið.

## Dysturin í tølum:

**VÍF-Tjaldur 33-32 (14-12)**

Málskjúttar:
VÍF: Sámal Joensen 6(1), Rógvi Nielsen 5, Áki Olsen 4, Agnar Joensen 4(1), Ragnar Zachariasen 4, Harald Bjørgvin 2, Ingi Olsen 2, Daniel Rápa 2, Piti Negru 2, Johnny Joensen 2
Tjaldur: Sverri Justinussen 11(1), Svein í Heiðunum 6, Dragisa Stojovic 6, Mortan Hansen 6(1), Tummas Magnussen 2, Dan Thorleifsson 1
Brotskøst: VÍF 6, Tjaldur 2
Útvísingar: VÍF 1, Tjaldur 2
Dómarar úr StÍF/Kyndli: Artur Johansen & Ragnar Simonsen.